# Miðvikan

**Janus í Dímun:**

# Glaðaðu og fingu post aðru hvørja viku



**I seinasta parti greiddi Janus frá, hvussu hann sum nýføðingur misti pápa sín. Hesa ferð greiðir hann frá síni skúlagongd, og tá ið einasti samskiftismøguleiki var glaðing**

**4. partur**

## Skúlagongd í Skúvoy og Dímun

Í Dímin var altíð nógv fólk í húsi. Tað mundi vera sjáldan, at vit vóru niðanfyri 10. Tað vóru húsfólk og so arbeiðsfólk afturat. Ofta vórðu eisini fólk send til Dímunar, sum høvdu tað, vit í dag kalla atferðartrupulleikar. Eitt dømi var ein, sum kom til Dímunar í 1928, og sum fór avstað aftur í 1943.

Hesi fólkini arbeiddu so fyri føðina. Tey artaðu seg væl úti í Dímun, og vanliga eisini, tá ið tey komu heim aftur.

Við skúlagongd var tað soleiðis, at trý tey fyrstu árini gekk eg í skúla í Skúvoy, har eg átti ommu og abba.

Tá var tað ikki soleiðis, at tað slapst heim hvørt vikuskifti! Eg fór heim til Dímunar í summarferiu. Tað, sum eg kann minnast, fór eg gjarna ikki aftur til Skúvoyar fyrr enn upp undir jól. Lærari í Skúgvi var alla mína tíð Malvina Clementsen, ættað úr Húsavík. Hon var eisini í Hesti áðrenn tað. Malvina var kend sum ein sera markant kvinna.

Eg var nógv í Skúvoy sum óviti, so eg minnist akkurát læraran, sum var undan Malvinu. Tað var Martin Joensen Næss. Hann var skúvoyingur, men hann fór tá til Vágarnar. Eg kom tískil at kenna allar skúvingar eins væl sum eg kendi dímuningar. Fleiri av teimum var eg eisini í ætt við.

Tað var einki telefonsamband til Dímunar, so vit vistu ikki av hvørjum øðrum í Dímun og Skúvoy.

Men so søkti mamma um at fáa lærara til Dímunar. Men tað kravdi, at tað vóru tvey skúlabørn. Jóannes í Malthúsi, sum búði nógv í Dímun tá, átti eina gentu, sum var hálvtannað ár eldri enn eg. Hann tók hana so til Dímunar. Nú vóru vit tvey, og soleiðis fingu vit tann fyrsta læraran. Tá var eg 11 ára gamal. Lærari var í Dímun út í eitt líka til míni systkin vóru liðug at ganga í skúla í 1951. Skúlin var í eini stovu uppi á loftinum hjá okkum. Fyrsti lærari, sum eg annars hevði



*Fyrsti lærari hjá Janusi á Dímun var Elisabeth Waag*



*Næsti lærarin var Leif Tróndarson*

í Dímun, var Elisabeth Olsen úr Vestmanna. Hon var fyrra kona Einar Waag, kendur frá Føroya Bjór. Hon var lærari í Dímun 1934/1935. Hon doyði longu í 1941. Aftaná hana gjørdist tað Leivur Tróndarson úr Skálavík. Hann var ferðalærari í Dímun frá 1935-1938. Hann gjørdist seinni lærari í Skálavík.

## Telefon og ruta

Fyrsta eg minnist var sambandið til Dímunar meira at kalla vánaligt. Serliga minnist eg veturin 1936/37 sum sera ringan við liggjandi vánaligum veðri.

Tá var leingi einki samband við oynna, so vit vistu einki um, hvat ið var hent í allari verðini. Einaferð slapp lærarin ikki í jólafrí fyrr enn á føstulávint. Eg meini, at tað var hálvan november, at tann seinasti fartur var.

Tað var sami bátur, sum sigldi til Dímunar, Skúoyar og Sand. Eg minnist, at tey snakkaðu um tað, at tað var eingin dagur, at tað var so frægt veður, at tað var siglandi báðar vegir.

Eina ferð tað varð gjørd ein roynd at fara úr Skúvoy til Sands eftir posti, lógu teir veðurfastir á Sandi eina heila viku. Tað var sami postmaður, sum førdi postin millum Sand og Skúvoy og so til Dímunar.

Postmaðurin var Óla Jákup Hentze, seinni saman við soninum Johan Hentze. Hann var fyrsti postmaður í Skúvoy.

Seinni tók sonur Óla Jákup, Kjartan, við postinum, og Johan beiggi hansara var ofta við honum.

Tað fasta postsambandið var tvær ferðir um mánaðin. Men um veturin vóru vit nøgd um vit kundu fáa post eina ferð um mánaðin.

Postbáturin var eitt vanligt áttamannafar við maskinu. Tá tað gekk væl, kom postmaðurin upp gjøgnum Kleivina, og vit vistu í av, fyrr enn hann kom og pikkaði á dyrnar.

Men so væl gekk ikki altíð. Eina ferð mátti postbáturin seta upp í Dímun. Hann slapp ikki avstað fyrr enn dagin eftir.

Eg royndi í 1946 at fáa postverkið at lata okkum fáa post eina ferð um vikuna, men hetta lat seg ikki gera.

Men í 1971, tá ið vit bert búðu í Dímun summarhálvuna, fóru vit at fáa post tvær ferðir um vikuna.

Við tyrluni er tað nú 3 ferðir um vikuna. Hetta er líka nógv sum nú hjá øllum øðrum í landinum.

## Máttu glaða í neyðstøðu

Vit fingu ikki telefon fyrr enn í 1938 í Dímun. Hetta var radiotelefon Men áðrenn telefonin kom máttu vit glaða, um tað vóru bráfengisboð. Tað varð gjørt í einum føstum plássi eystan frá húsinum. Haðani sást so væl inn á Nes í Hvalba. Eg minnist einar tríggjar ferðirnar, at tað bleiv glaðað. Vit settu eld á hoyggj. So kom bátur út. Tað var vanliga ein deksbátur úr Sandvík, sum kom at spyrja, hvat ið bagdi.



*Foreldrini hjá Janusi, Hansina og Óla Jákup Jensen*

Var tað læknahjálp, sum kravdist, fór hann til Sands eftir lækna. Á vegnum til Sands legði hann at í Skúvoy at boða frá, hvørji ørindini vóru. Tá ið báturin kom aftur við læknanum, fleyt ein bátur útfyri við skúvoyingum í. Hesin bátur varð sleipaður við til Dímunar, so hann kundu føra læknan í land.

Tað var ofta fjøruveður øðrumegin oynnna og brim hinumegi. Men tað vóru tvær lendingar, onnur eystanfyri og hin vestanfyri. Vanliga var tað lendingin vestanfyri, sum varð nýtt.

Slík læknaørindini kundi taka langa tíð. Báturin bíðaði í Dímun, til læknin hevði gjørt tað, sum skuldi gerast. So fóru teir avstað aftur til Skúvoyar og Sands, har læknin fór í land, og so gekk leiðin aftur til Sandvíkar.

Ta einu ferðina bleiv so ringt veður. Tað var ein mostur mín, sum hevði mist svøvnin. Hetta var í 1935.

Tað var eitt ringt skil. Sámal Jákup pápabeiggi helt henni alla náttina. Men læknin kom so av Sandi. Hann gav henni sproytu, so hon sissaðist og fekk svøvnin aftur. Tað var ikki veður at fara til Sands við læknanum, so teir máttu fara við honum til Sandvíkar.

Mostur lá nakrar dagar í Dímun, áðrenn hon slapp avstað fyri veður.

**Rætting til seinasta part:** Tað var beiggi Hansinu, Sámal Johannes, sum hjálpti systrini við garðinum eina tíð eftir, at Óla Jákup doyði í 1924.